Børn við talutrupulleikum við sviðusoð:

# Seinasti talulærarin gevst vegna ov stórt trýst

**– Eg havi ongan møguleika at nøkta ein so stóran tørv, sigur Doris Hansen, sum er talulærari. Á bíðilista standa umleið 50 børn, sum ætlanin var, at Doris skuldi verða talulærari hjá, men við 15 tímum um vikuna er hetta púrasta ógjørligt**



*Doris Hansen er einasti talulærarin av fýra, sum er eftir til alt smábarnaøkið í Tórshavnar Kommunu. Hon fer nú at gevast, tí hon metir seg ikki vera føra fyri at nøkta henda tørvin, áljóðandi 15 klokkutímar til 50 børn, einsamøll*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

TALUTRUPULLEIKAR
*Ingrid Bjarnastein*

Umleið 50 børn undir skúlaaldur í Tórshavnar Kommunu metast at hava tørv á taluhjálp. Men til øll hesi 50 børnini er bert ein talulærari, sum arbeiðir niðursetta tíð áljóðandi 15 klokkutímar.

Ein yvirgang vóru tað heili fýra talulærarar á Sernámsdeplinum. Men hinir tríggir talulærararnir eru farnir frá av ymsum orsøkum. Aldur og sjúka hava gjørt seg galdandi, og nú er bert ein talulærari, sum arbeiðir niðursetta tíð eftir.

– Eg meti meg ikki vera føra fyri at nøkta ein so stóran tørv, og tað havi eg heldur ongan møguleika fyri at gera á ein ráðiligan hátt við bert 15 tímum, sigur Doris Hansen, sum nú er einasti talulærari til alt smábarnaøkið hjá Tórshavnar Kommunu.

– Tað er ikki moralskt rætt, og tí haldi eg, at tað skal heldur vera eingi taluundirvísing. Eg kann ikki fara at pilka burturúr teimum 50 børnunum, sum standa og bíða, tí so vil eg heldur gevast.

Eitt annað talulærarastarv er normerað, men av tí, at peningajáttanin er ov lítil, so strekkja pengarnir ikki so langt. Søkt hevur verið eftir meira peningi, men svarið er bert, at meira peningur er ikki tøkur.

### Ráðgevi

Doris Hansen heldur, at tað er púra burturvið, at skula býta 15 klokkutímar um vikuna millum 50 børn. Hetta letur seg als ikki gera. Í miðal gevur hetta 18 minuttir um vikuna til hvørt barnið.

Trupulleikin hevur verið leingi tilstaðar. Seinastu árini hevur verið soleiðis, at børnini hava havt talubólkar, har fimm børn hava verið í hvørjum bólki. Henda undirvísingin hevur gingið fyri seg úti á Sernámsdeplinum av praktiskum orsøkum. Tey børnini, sum so ikki gingu í talubólk, hevur verið koyrt út til á teimum ymsu stovnunum í Havnini.

– Stjórin hjá mær, Hans Eli Dahl, er samdur í tí, sum eg sigi. Hann hevur skotið upp, at eg kann virka sum ein ráðgevi fyri teir ymsu stovnarnar, har arbeiðsfólkið á stovnunum síðani hjálpir børnunum við talutrupulleikum. Við míni hjálp væl at merkja, greiðir Doris Hansen frá.

Men aftur her er heilt greitt, at 15 tímar um vikuna er alt ov lítið.

– 15 tímar um vikuna til allar teir stovnarnar og alla dagrøktina í Havn, Velbastað og Kaldbak er eisini ov lítið. Og um eg so eisini skal skipa fyri skeiðum dettur hetta púra burtur í einki.

– Eg havi arbeitt sum talulærari síðani 1980, og á henda hátt vil eg ikki enda. So skal eg heldur gevast, sigur Doris, sum heilt týðiligt er kedd av, at ikki kunna veita taluundirvísing til øll børnini á listanum.

Hvar málið liggur í løtuni veit Doris Hansen ikki. Einasta hon veit at siga er, at stovnsleiðararnir í Havnini fara at hava fund í næstum, har hetta málið verður tikið til viðgerðar.



*Smábørn við talutrupulleikum í Tórshavnar Kommunu verða nú við sviðusoð. Ongin talulærari er til tey 50 børnini, sum standa á listanum og bíða*

*Tilvildarlig mynd*

## Annlis á fundi

Vit hava roynt at fingið fatur á landsstýriskvinnuni í undirvísingar- og mentanarmálum, Annlis Bjarkhamar, til eina viðmerking. Men vegna fundarvirksemi var landsstýriskvinnan ikki at hitta áðrenn blaðið fór til prentingar. Vónandi verður ein viðmerking frá Annlis við í blaðnum í morgin.

**-ib**

## Støðan er ótolandi

**Hans Eli Dahl, sum er stjóri hjá Doris Hansen, sigur, at støðan sum hon er nú, er ótolandi**

TALUTRUPULLEIKAR
*Ingrid Bjarnastein*

– Besta og einasta tilboðið vit hava at geva nú er, at Doris fer at virka sum ein ráðgevi, men tað er rætt, at við 15 tímum megnar hon ikki nógv, sigur Hans Eli Dahl á Sernámsdeplinum.

Hans Eli Dahl er púra samdur við Doris Hansen í, at 15 tímar til 50 børn er alt ov lítið.

– Vit hava roynt at gera alt tað, vit kunnu. Og vit hava roynt at fáa so frægt av fígging fyri at kunna seta ein talulærara afturat, men hetta letur seg ikki gera. Tað liggja nógv tilmæli frá okkum uppi í Mentamálaráðnum, men málið kemur ikki víðari, greiðir Hans Eli Dahl frá.

Á Mentamálaráðnum verður boðað frá, at arbeitt verður við batum, men trupulleikin er so mikið gamal nú, at Sernámsdepilin, setur seg ikki vera føran fyri at nøkta henda ovurhondsstóra tørvin við so lítlum ressursum.

Tí verður ongin talulærari til smábørnini fyrr enn ein loysn er funnin, og sigur Hans Eli Dahl, at hetta er tað einasta Sernámsdepilin kann gera í løtuni.



# Nýggj matstova á Viðareiði

**Nýggj matstova er í gerð á Viðareiði. Latið verður væntanti upp einaferð í heyst. At hotel er í bygdini frammanundan sær nýggi matstovueigarin ikki sum nakra forðing**

MATSTOVA
*Edvard Joensen*

**Viðareiði:** Nýggj matstova, Matstovan hjá Elisabeth, letur væntandi upp á Viðareiði einaferð í heyst. Okkurt loyvi manglar enn, men innrættingin er í gongd.

Tað er Elisbeth Nybo á Viðareiði, sum er farin undir hesa ætlanina. Hon er útbúgvin kokkur og hevur millum annað eisini eitt tíðarskeið leigað Hotel Norð á Viðareiði.

At hotel er á Viðareiði frammanundan, sær Elisabeth Nybo ikki sum nakra forðing fyri, at ein matstova burturav kann vera í bygdini. Tað unga fólkið ger í dag meira av at fara út at fáa sær ein góðan bita. Eitt nú, tá ymisk tiltøk eru, so sum dansur og tílíkt, er ikki óvanligt, at fólk fara í felag at fáa sær ein bita, áðrenn farið verður víðari. Og tað er ein slíkan møguleika, hendan nýggja matstovan fer at geva fólki.

– Tað verða neyvan bara viðingar, sum fara at brúka hana, men fólk ymsastaðni frá. Klaksvíkin liggur tætt við, og tað er so passaligt at ringja og bestilla, tá ein fer úr Klaksvík, so er klárt, tá tey koma norður, vísir hon á.

Matstovan veðrur innrættað í kjallarhæddini í egnum sethúsum hjá eigaranum, har kiosk framman undan er. Eitt sindur av flyting verður, og onkur skilaveggur skal takast niður fyri at gera pláss fyri sjálvari matstovuni. 30 fólkum, sum loyvið sigur, ætlar Elisabeth Nybo at hava pláss fyri inni á matstovuni.



*Kioskin skal flytast fyri at gera pláss fyri nýggju Matstovuni hjá Elisabeth á Viðareiði. Elisabeth er sjálv farin í holt við málingarulluna*

*Mynd: Edvard Joensen*

Tað krevjast nógv loyvi til at lata eina matstovu upp. Eitt nú Brunaumsjónin, Arbeiðseftirlitið og Heilsufrøðiliga Starvsstovan skulu uppí, áðrenn farast kann í gongd. Higartil eru loyvi fingin frá Brunaumsjónini og Arbeiðseftir-litinum, men bíðan enn verður eftir Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

Elisabeth Nybo hevur keypt spildurnýggja køksútgerð, sum er sett upp, og klárt er í grundini at byrja, so skjótt endaligt loyvi er komið frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, sigur hon. Tá hugsar hon um, at hóast innrættingin av sjálvari matstovuni ikki er rættiliga liðug, kann hon byrja við at gera mat og koyra heim til fólk ella fyritøkur, sum ynskja tað, tí køkurin er klárur.

Hon sigur, at hon fer ikki at leggja seg eftir nøkrum heilt ávísum soleiðis, men royna at hava tað, fólk biða um. Tó ætlar hon, at føroyskur matur sum eitt nú lundar, sum fleiri ferðafólk spyrja eftir, skal vera at fáa. Annars verður alt tað vanliga, sum fólk nú einaferð plaga at biða um, sigur hon.

Nýggja matstovan á Viðareiði skal vera opin alt árið.

– Tað vil siga, sigur Elisabeth Nybo, at um summarið verður opið hvønn dag frá middegi til klokkan átta-níggju á kvøldi. Um veturin ber tó ikki til at hava opið soleiðis hvønn dag, væntar hon, men leggur tó dent á, at tað altíð ber til at biða um at fáa ein bita, tí tað er bara at ringja, sigur hon. Telefonin fer altíð at verða tikin.

Tað kostar nógv at fara undir slíkt tiltak, sigur Elisbeth Nybo, uttan tó at vilja koma nærri inn á prísin.

Umframt matstovuna er eisini kiosk í somu húsum. Hon er, sum er, opin gerandisdagar frá klokkan sjey á morgni til klokkan ellivu á kvøldi. Um vikuskiftini letur tó ikki upp fyrr en klokkan trý seinnapartin, sigur Elisabeth Nybo.

# Allur fiskurin á Vestsmolt dripin

**Alt smoltið á smoltstøðini Vestsmolt á Viðareiði er dripið. Sjúka kom í, og eigararnir valdu at taka alt av**

ALING
*Edvard Joensen*

**Viðareiði:** Sjúka kom her fyri í smoltið á smoltstøðini Vestsmolt Inni á Dølum á Viðareiði, og valt varð at taka allan fiskin av fyri á tann hátt at forða fyri, at sjúkan breiddi seg.

Ragnar Joensen, sum hevur ábyrgdina av smoltalingini hjá Vestsalmon, ið eigur Vestsmolt, sigur, at sjúkan BKD var komin í fiskin á Viðareiði. Fyri at steðga útbreiðslu, varð gjørt av at taka allan fiskin, sum hann var. Talan var um einar tvær milliónir fiskar, sigur Ragnar Joensen.

BKD sjúkan er ikki ókend á okkara leiðum. Hon kom til Føroya einaferð fyrst í nítiárunum, greiðir Ragnar Joensen frá. Higartil hevur hon mest gjørt um seg í alibrúkum á sjónum, hóast hon eisini hevur verið at sæð á smoltstøðum uppi á landi.

Tað er komið fyri, at smittað smolt er koyrt á sjógv. Men tað metir Ragnar Joensen vera eina vánaliga loysn, tí sjúkan ger tá bara meira um seg.

At teir nú hava valt at taka allan fiskin á Vestsmolt ger sjálvandi, at hol verður í framleiðsluni. Men tað er kortini ikki veri enn so, at til ber at framleiða seg burtur úr missinum, heldur hann. Vestsalmon hevur aðrar møguleikar at fáa smolt, vísir hann á. Eitt nú eigur felagið stóru smoltstøðina Laksá á Hellunum.

### Byggja út

Bygt er út á Viðareiði eins og á Hellunum, greiðir Ragnar Joensen frá. Báðar støðirnar hava fingið nógv størri vatnkapasitet, soleiðis at til ber at hava fiskin nógv longri uppi á landi, enn fyrr var gjørligt.

Vanligt hevur verið at sett fiskin á sjógv, tá hann vigaði umleið 30 til 50 gram. Men nú fer at bera til at hava hann inni á støðunum, til hann vigar 75 til 100 gram ella kanska enn meira.

– Tað ger tíðina, hann gongur á sjónum, styttri og minkar samstundis um vandan fyri sjúkum, greiðir Ragnar Joensen frá. Tað er á sjónum, fiskurin er mest útsetur fyri sjúkum, sigur hann.

Í løtuni stoypa teir gólv á Vestsmolt Inni á Dølum. Men klárt verður at koyra fisk í aftur kørini, tá strokið verður í heyst. Einaferð í november-december strúka tey, og so verður aftur lív í kørunum á Viðareiði, sigur Ragnar Joensen.

Vestsalmon hevur ikki rognaframleiðslu. Tað eru bara Fiskaaling og Fútaklettur, sum hava lívfisk, og haðani fær Vestsalmon øll rognini til sínar smoltstøðir, sigur hann.

### Ófarlig fyri fólk

BKD er sjúka, sum ikki rakar fólk, sigur Bjørn Harlou, landsdjóralækni.

Fiskur, sum er raktur av sjúkuni, kann seljast, um sjúkan ikki er staðfest í sjálvum fiskinum ella vøddunum.

BKD er bakteriusjúka, sum vanliga rakar innvølin á fiski. Hon setir seg sum bruni í livur, milt og nýru. Men hon kann eisini breiða seg til vøddar og út í sjálvan fiskin, greiðir landsdjóralæknin frá. Tó er hon púra vandaleys fyri fólk, sigur hann.

Fiskur, sum bert hevur sjúkuna í innvølunum, kann brúkast, men er sjúkan staðfest í eitt nú vøddunum, gerst einki.

Bjørn Harlou, landsdjóralækni, greiðir frá, at smittan kann verða borin við rognum. Sjúkan er vanligast, eftir at fiskurin er komin á sjógv, men kann eisini síggjast á smoltstøðunum av og á, sum dømi nú var um á Viðareiði.



*Smoltstøðin Vestsmolt Inni á Dølum á Viðareiði stendur tóm í løtuni. Allur fiskurin var tikin av herfyri, tí sjúka var staðfest inni á støðini*

*Mynd: Edvard Joensen*